# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BERT LÚSIN ÚTLENDSK ER

Umsíðir verður almenna miðfyrisitingin, sum Edmund Joensen setti í verk eftir leistinum hjá Finn Norman-Christensen, eftirmett og eftirkannað. Mikil orðadráttur hevur verið um hesa skipan, sum nú kostar tríggjar ferðir so nógv, sum hon kostaði í 1997 – og sum hevur sprongt onkra samgonguna eisini.

Tað var Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, sum legði uppskot fram til samtyktar um hesa kanning. Og tann 10. mai samtyktu øll tey 28 tingfólkini, sum vóru á fundi, einmælt uppskotið. Tveir dagar seinni fegnast løgmaður í tíðindaskrivi um hesa einmæltu samtykt. Ikki tí at hann heldur, at skipanin ikki er góð nokk, men tí hann fegin vil, at skipanin »gerst betur før fyri at røkja sínar skyldur í einum støðugt meira krevjandi umhvørvi, har meira má fáast fyri minni.«

Men hvør skal so gera hesa eftirmeting? Jú, løgmaður hugsar sær, at henda kanning skal gerast av væl skikkaðum, uttanveltaðum fólki, og her sær løgmaður møguleikan at fáa serfrøðingar í OECD at gera eina slíka kanning.

Ivaleyst hava fólkini hjá OECD førleikar til slíkt, men tað at gera eina slíka eftirkanning er nú ikki nøkur rakettvísund. Tað kann ikki passa, at eingin í Føroyum uttan fyri almennu miðfyrisitingina hevur skil fyri at gera eina slíka kanning. Fyri tað um slík vitan ikki er í miðfyrisitingini, so kann hon vera onkra aðrastaðni.

Tað tykist ikki sørt eyðmýkjandi, at Føroyar eins og eitt annað menningarland skal biðja OECD um hjálp at eftirkanna okkara pinkulítlu almennu umsiting – sum kanska hevur vaksið seg alt ov stóra.

Trekkið hjá Edmund Joensen við Finn Norman-Christensen var ikki væleydnað. Skal tann næsti sambandsløgmaðurin nú gera sama mistak enn einaferð? Almenna miðfyrisitingin er bólgnað nógv hesi árini. Vøksturin frá 1997 til 2010 er 300 prosent – vaksin úr sløkum 46 milliónum krónum til slakar 138 milliónir krónur frá Edmundsa tíð,



undir Anfinn og Jóannes og fram til Kaj Leo. Tað er ikki hissini, og talið á aðalráðum er eisini vorðið ein politisk kabal, sum skal ganga upp eftir hvørt val. Hesaferð varð talið níggju, sum uttan iva er 50 prosent ov høgt.

Vit kunnu bara geva uppskotsstillaranum rætt, tá hann vísir á, at ein skipan, sum er gjørd til at stjórna fimm milliónum fólkum valla er hóskandi í einum landi, hvørs íbúgvaratal má roknast í promillum av fimm milliónum. Endurtakið tí ikki stóra mistakið enn einaferð – vit eiga uttan iva knokkar, sum kunnu siga, hvar skápini í miðfyrisitingini skulu standa.

## Prísurin fyri miðfyrisitingina er trífaldaður



# Trupulleikar av Bagger-samrøðu

DR fer ikki aftur at keypa sendingar, sum starvsfólk hjá DR gera freelance, eins og gjørt varð, tá Reimer Bo Chreistensen hendan dagin hevði samrøðu við stórsvindlaran, Stein Bagger.

Hetta sigur Ulrik Haagerup, sum er tíðindastjóri hjá Danmarks Radio við Berlingske.dk. Hann kann ikki ímynda sær, at DR aftur fer at keypa privatframleiddar sendingar frá teirra egnu journalistum, so sum gjørt við Reimer Bo Christensen.

– Hann arbeiðir niðursetta tíð, og hann hevur loyvi til at gera annað fyri DR, um tað er í frítíðini. Og tað var tað í hesum føri, sigur tíðindastjórin.

Álitisfólkið hjá journalistunum hjá DR Nyheder, Dines Boertmann, setur spurnartekin við hendan framferðarháttin. – Eg havi ikki sæð slíkt áður. Hetta er jú sama arbeiðspláss, sigur hann.

Eftir Bagger-samrøðuna heklar kritikkurin yvir Reimer Bo, sum umframt ákærurnar um at hava tjent pengar upp á at selja samrøðuna til Danmarks Radio, einsini verður ákærdur fyri ikki at seta Stein Bagger kritiskar spurningar. B.T. leggur hann eisini undir at hava gegnistrupulleikar, tí hann tvær ferðir hevur arbeitt fyri IT-Factory hjá Stein Bagger.

Umframt tað kom fram í gjár, at TV2 í meira enn eitt ár hevur roynt at fingið eina samrøðu við Stein Bagger, men mátti uppgeva, tí hann setti sjónvarpsstøðini krøv, sum gingu ímóti journalistisku prinsippunum hjá TV2.



## Power to the people

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 12



## Greið tala frá Helle

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 13



# Fáa visum í Reykjavík

Uttanríkisráðið hevur gjørt avtalu við amerikonsku sendistovuna í Keypmannahavn um, at føroysk lesandi nú eisini kunnu fáa visum til USA avgreitt á amerikonsku sendistovuni í Reykjavík. Henda loysn varð avrádd á fundi millum Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra, og Laurie S. Fulton, sendikvinnu hjá USA, í Keypmannahavn herfyri.

Avgreiðslutíðin til visum á amerikonsku sendistovuni í Reykjavík er bert umleið eitt samdøgur, og við hesum hava lesandi møguleika at fáa visumumsóknina avgreidda ávegis til USA. Hetta skuldi lætt um tey praktisku viðurskiftini hjá teimum lesandi.

Seinnu árini eru amerikonsku visumreglurnar nógv herdar, og eitt av nýggju krøvunum er, at umsøkjarar noyðast at møta persónliga á eini amerikanskari sendistovu fyri at fáa visum útflýggjað. Higartil hava føroysk lesandi verið noydd at fara á amerikonsku sendistovuna í Keypmannahavn, har ið avgreiðslutíðin er rættiliga drúgv. Tí hava lesandi mangan verið noydd at gera tvær ferðir – eina til Keypmannahavnar at fáa visum, fyri síðani at ferðast til USA at byrja lesnaðin.

Nú hava tey lesandi so møguleika at velja, um tey vilja avgreiða sítt visum á amerikonsku sendistovuni í Keypmannahavn ella í Reykjavík.

Fyri at søkja um visum á amerikonsku sendistovuni í Reykjavík, ber til at fara inn á hesa slóðina: http://iceland.usembassy.gov/student_visas.html

Annars fæst samband við føroysku sendistovuna í Reykjavík á heimasíðuni: www.faroes.is ella á teldupósti: reykjavik@mfa.fo, ella á telefon: +354 511 3200.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*